LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

**Svar uppá**

**Skrivligan fyrispurning frá Jaspur Langgaard, løgtingsmanni viðvíkjandi herðing av átøkum ímóti pedofili í Føroyum**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1. Hvør er revsingin fyri pedofili í Føroyum samanborið við hini Norðurlondini?
2. Eru politiskar ætlanir um at skapa lógarheimildir fyri at kunngera navnið á einum persóni, sum er dømdur fyri pedofili, taka passið frá viðkomandi, áseta aðrar fyrningarfreistir o.a.?
3. Hvussu kunnu ofrini verða vard, meðan ein ákæra verður rættarliga viðgjørd?
4. Hvussu kann best tryggjast, at misnýtsla av børnum ikki heldur fram í førum, har pedofilar flyta ella verða fluttir til annað stað at búgva?
5. Hvørji ítøkilig tiltøk ætlar løgmaður at fremja av herðing ímóti pedofili í Føroyum?

**Svar**

**Til spurning 1:**

Ásetingarnar um kynslig brotsverk, sum eru at finna í kapittul 24 í revsilógini, vóru dagførdar í 2017.

Revsingin varð í nógvum førum skerpað og ásetingarnar vóru gjørdar greiðari. Ásetingarnar um kynslig brotsverk eru tí so at siga tær somu sum í donsku revsilógini. Revsikarmurin, tvs. hvussu nógv man í mesta lagi kann revsast fyri eitt ítøkiligt brotsverk, er eisini tann sami sum í Danmark.

Revsingin fyri ítøkilig brotsverk hongur neyvt saman við, hvussu álvarsligt brotið verður mett at vera. Fyri tey mest álvarsligu brotini mótvegis børnum undir 12 ár, børnum millum 12 og 15 ár og ung millum 15 og 18 ár, er revsikarmurin fongsul í upp til 12 ár. Hesin revsikarmur er millum tær strangastu revsingarnar í revsilógini.

Um talan er um sera álvarslig kynslig brotsverk og hesi brotsverk verða endurtikin, er heimild fyri at døma ein persón í trygdarvarðhald (forvaring). Trygdarvarðhald er ein fyriskipan, sum ikki er


Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306021/52· info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

tíðarbundin, men sum ikki má vara longur enn neyðugt. Avgerð um at fyriskipanin skal steðgast, verður tikin av dómstólunum við úrskurði.

Í 2016 varð ein kanning gjørd av øllum dómum (57) á hesum økinum í árunum 2000 til 2014 í sambandi við kandidatritgerð í løgfrøði . Hendan kanning vísti, at nógv fleiri mál viðvíkjandi kynsligum brotsverkum móti børnum enda við dómi í Føroya rætti enn í samsvarandi málum í donskum býrættum. Tað sæst, at í nógvum málum er gerningsmaðurin bert lutvíst sekur. Yvirlit yvir hesar dómar er lagt við sum fylgiskjal.

Um rættarstøðan viðvíkjandi kynsligum brotsverkum verður samanborin við Noregi, kann staðfestast, at revsikarmurin í Noregi í ávísum førum er hægri enn í Føroyum. Norska lóggávan á hesum økinum er tó skipað øðrvísi enn Føroyum og kann tískil ikki beinleiðis samanberast við føroyska og danska lóggávu á hesum økinum. Tað hevur ikki verið møguligt at finna eitt yvirlit, sum vísir norskar dómar viðvíkjandi ítøkilig kynslig brotsverk.

Um hugt verður eftir svenskari lóggávu, er revsikarmurin fyri kynslig brotsverk í Svøríki linari enn í Føroyum, eisini tá talan er um tey álvarsligastu kynsligu brotsverkini. Svenska lóggávan á hesum økinum er tó eisini skipað øðrvísi enn í Føroyum og kann tískil ikki beinleiðis samanberast við føroyska og danska lóggávu á hesum økinum.

**Til spurning 2:**

Tað eru í løtuni ongar politiskar ætlanir um at lóggeva, soleiðis sum spyrjarin leggur upp til. Av hesi orsøk eru m.a. teir løgfrøðiligu ivaspurningarnir, sum eru knýttir at hesum, ikki endaliga umrøddir.

Yvirskipað kann tó viðmerkjast, at almannakunngering av navni ella at taka pass frá fólki eru sera víðfevnd inntriv, sum altíð skulu nýtast við størsta varsemi. Ivasamt er, um hesi inntriv liggja innanfyri teir karmar, sum føroysk lóggáva eigur at liggja innanfyri, t.d. Evropeiska Menniskjarættindasáttmálan (EMRS).

Endamálið við revsing er m.a., at gerningsmaðurin ikki skal endurtaka tey somu brotini. Revsingin skal tí vera effektiv, men samstundis standa í røttum lutfallið við brotið.

Almannakunngering av navni hevur við sær, at tað ikki er møguligt hjá einum persóni, hvørs navn verður almannakunngjørt, at koma víðari í lívinum eftir, at viðkomandi t.d. hevur sitið eina fongsulsrevsing. Ein tílík skipan er tí við til at stigmatisera og at fasthalda fólki í eini ávísari støðu, har endurtøka av einum broti verður meira nærliggjandi. Tá tað er sagt skal vísast á, at tað longu í dag eru møguleikar innanfyri § 236 a í revsilógini í einum dómi at áseta m.a. tilhaldsforboð ella vitjanarforboð o.a. fyri persónar, sum eru dømdir fyri kynsliga misnýtslu av børnum.

Um at taka pass frá einum persóni, sum verður dømdur fyri kynsliga misnýtslu av børnum, er serliga at viðmerkja, at samstundis sum hetta er eitt sera víðfevnt inntriv fyri tann einstaka, forðar inntrivið ikki á nakran hátt fyri, at viðkomandi kynsliga misnýtir børn.

Í hesum samanhangi skal vísast á, at kynslig misnýtsla av børnum kann revsast, hóast misnýtslan fer fram í einum øðrum landi, um so er at gerningsmaðurin í skuldsetingarløtuni hevur danskan ríkisborgararætt ella hevur bústað ella líknandi fast uppihald í ríkinum, sbr. § 7, stk. 1, nr. 2, litra a í revsilógini.

Samanumtikið verður mett, at tey amboð, sum eru í verandi løggávu, eru nøktandi.

Viðvíkjandi áseting av øðrum fyrningarfreistum, er tað at siga, at fyrningarfreistin fyri kynslig brotsverk móti børnum, í verandi løggávu ikki byrjar at renna fyrr enn viðkomandi fyllir 21 ár. Fyrningarfreistin fyri mál, sum snúgva seg um samlegu ella kynsligt samband við barn undir 15 ár, er 10 ár, roknað frá tí degi viðkomandi fyllir 21 ár. Um talan er um grovar umstøður, ella barnið er undir 12 ár, er fyrningarfreistin 15 ár, roknað frá tí degi viðkomandi fyllir 21 ár.

Tað merkir, at fyrningarfreistin í minsta lagi er 16 ár og í mesta lagi 36 ár í mun til, nær lógarbrotið er framt.

Hetta eru tær longstu fyrningarfreistirnar í revsilógini undantikið fyri dráp.

Í málum um kynslig brotsverk eru sjáldan onnur vitni til staðar enn órættaði og gerningsmaðurin. Um tilburðurin ikki verður meldaður beinanvegin, eru sjáldan nøkur teknisk prógv, og próvgrundarlagið er sostatt sera veikt.

Í einum revsimáli er tað týdningarmikið at minnast til, at vitnisprógv frá órættaða ikki í sjálvum sær er nokk til at lyfta próvbyrðuna. Ákæran má undirbyggjast við øðrum vitnisfrásøgnum ella tekniskum prógvum.

Tá rættarmál í so stóran mun er grundað á vitnisfrásagnir, er tað soleiðis, at longri tíð gongur, áðrenn meldað verður, verri verður tað eisini at lyfta próvbyrðuna.

Hetta er ein trupulleiki bæði fyri tann, sum verður ákærdur fyri kynslig brotsverk, og fyri offurið. Tann, sum verður ákærdur, fær trupult við at verja seg, og órættaði fær trupult við at prógva tilburðin. Hetta ger tað sjálvsagt eisini trupult hjá løgregluni at finna prógv, sum halda í rættinum, og sostatt verður tað eisini verri at fáa dóm í einum máli, longri tíð gongur, áðrenn tilburðurin verður meldaður.

Um fyrningarfreistin verður longd ella strikað, er vandi fyri, at mál verða meldað upp aftur seinni við tí úrsliti, at tað ikki er møguligt at lyfta próvbyrðuna.

Tað skal eisini viðmerkjast, at hóast eitt mál verður meldað, sum er fyrnað, so skrivar løgreglan frágreiðing um málið. Løgreglan kallar eisini viðkomandi, sum er undir illgruna, inn til eina samrøðu, har tað verður gjørt greitt fyri viðkomandi, at løgreglan kennir til málið og fer at gera skjótt av, um tey fáa vitan um nýggj mál.

Mett verður tí, at løggávan eisini á hesum økinum er nøktandi.

**Til spurning 3:**

Í frástøðuboðslógin, sum var samtykt í 2017, er heimild at geva einum persóni, sum er undir illgruna fyri neyðtøku ella onnur kynslig brotsverk, frástøðuboð ella uppihaldsforboð. Tað vil siga,

at ein persónur kann fáa forboð fyri at leita upp ein annan persón fysiskt, munnliga ella skrivliga ella á annan hátt at seta seg í samband við ella at elta viðkomandi. Eisini kann persónurin fáa forboð fyri at vera ella ferðast á einum nærri tilskilaðum øki nærhendis bústaði, arbeiðsstaði, útbúgvingarstaði ella tilhaldsstaði hjá offrinum.

Í førum, har tað er grundaður illgruni um, at ein persónur hevur framt kynslig brotsverk, sum sambært revsilógini kann geva fongsul í meira enn 1 ár og 6 mánaðir er harafturat heimild at burturvísa persóninum úr heiminum í eitt tíðarskeið.

Mett verður at lóggávan á hesum økinum er nøktandi.

**Til spurning 4:**

Um hugsað verður um flyting til onnur lond, so er heimild í § 7, stk. 1, nr. 2, litra a í revsilógini fyri at revsa kynsliga misnýtslu av børnum, hóast misnýtslan fer fram í einum øðrum landi, um so er, at gerningsmaðurin í skuldsetingarløtuni hevur danskan ríkisborgararætt ella hevur bústað ella líknandi fast uppihald í ríkinum.

Um hugsað verður um flyting innanlands, so finst ein heimild í § 236 a í revsilógin fyri at seta ymisk forboð, samstundis sum dømt verður fyri kynslig brotsverk, t.d. kann setast forboð fyri at vera ella ferðast á einum ásettum øki. Tað kann setast forboð fyri uttan loyvi frá løgregluni at lata børn undir 18 ár halda til á bústaðinum, ella sjálvur at halda til hjá persónum, sum hava børn undir 18 ár búgvandi. Harafturat kann ásetast forboð fyri vitjan av børnum undir 18 ár, tá ið ein vaksin ikki er við, og tað kann setast forboð fyri gjøgnum internetið ella tílíka skipan at royna at fáa samband við børn undir 18 ár, ið ikki kenna tann dømda.

Hesi forboð kunnu verða galdandi í 1 til 5 ár, frá tí at endaligur dómur er sagdur, ella tað kann verða sett at galda í óásetta tíð.

Kynsligur ágangur eigur ongantíð at verða góðtikin og tað, sum hevur størstan týdning er tí í størst møguligan mun at fyribyrgja, at hetta hendir. Hetta gerst best við kunning, upplýsing, opinleika og viðgerð.

Heildarætlanin um kynsligan ágang, sum eitt samt Løgting samtykti skuldi gerast, leggur stóran dent á upplýsing og kunning, serliga varð dentur lagdur á at arbeiða við medvitinum hjá børnum um teirra rættindi, rættin til at seta mørk og at virða mørk hjá øðrum.

Av øðrum fyribyrgjandi tiltøkum í heildarætlanini kunnu nevnast:

- kunning til foreldur
- tilbúgvingarætlan á stovnum/skúlum
- trygd á netinum
- viðgerð til teirra, sum fremja kynsligan ágang
- almenn kunning

Ábyrgdin fyri at fáa sett tiltøkini í verk liggur hjá einum samskipara undir Almannamálaráðnum.

Besti møguleikin fyri at tryggja at misnýtsla av børnum ikki hendur er tí at halda áfram við kunning og upplýsing.

**Til spurning 5:**

Børn og ung hava rætt til eitt gott og trygt lív. Tí hevur tað stóran týdning at fyribyrgja, at tílík brotsverk henda. Fyri at náa hesum málinum haldi eg, at tiltøkini í heildarætlanini um kynsligan ágang eru góð amboð at tryggja hesum.

Harafturat er sjálvandi neyðugt allatíðina at kanna um lóggávan á hesum økinum er nøktandi og at gera neyðugar dagføringar.

Eg meti, at tær ásetingar og amboð, sum longu eru í revsilógini og í frástøðuboðslógini eru nøktandi í stríðnum ímóti pedofili. Eg meti eisini, at revsikarmurin fyri hesi brotsverk liggur á einum nøktandi støði.

Í Tinganesi, 8. november 2019

**Bárður á Steig Nielsen**

Løgmaður

Fylgiskjal: Retsafgørelser på Færøerne 2000 - 2014